# Gav deyðanum avboð



**Tann 6. februar 1958 hendi helst mest gitna vanlukkan í flogsøguni. Millum tey deyðu vóru átta spælarar hjá enska stórfelagnum, Manchester United. Nakrir av spælarunum høvdu boðið Kypriotiska John Yiannakis við á ferðina, men hann hevði flogræðslu, og gav tí avboð. Eftir fótbóltslandsdystin millum Kypros og Føroyar í fjør hittu vit John, sum einki hevði ímóti at siga søguna**

FÓTBÓLTSSØGA
*Jákup Mørk*

Lagnan vildi tað kanska so, at hendan søgan skuldi sigast júst nú. Kypriotiska landsliðslegan er í djúpari sorg eftir flogvanlukkuna, sum kravdi lívið á 121 fólkum. Harav flestu teirra eru av Kypros.

Umstøðurnar, tá vit hittu John, hava eisini onkursvegna samband til kalda veruleikan nú 10 mánaðir seinni. Saman við føroyska landsliðsferðalagnum sita vit báðir, myndamaðurin, nevnliga og bíða á gistingarhúsi. Eitthvørt bagir flogfarinum hjá Helio, sum hevur til uppgávu at føra okkum til Írlands, har næsti landsdysturin er á skránni. Tað flogfarið, sum var eitt av bara trimum í flotanum hjá Helio kom ongantíð fram ta ferðina, men varð standandi á breytini í Newcastle, og ístaðin var flogið við einum arabiskum leiguflogfarið til írska høvuðsstaðin. Í dag man tað renna okkum kalt niður at bakinum, tá vit frætta, at tað júst var eitt av teimum trimum flogførunum hjá lítla Kypriotiska flogfelagnum, sum var partur av vanlukkuni við grikska høvuðsstaðin sunnudagin.

## Søgan hjá John

Men eftir til John og søgu hansara. Hann hevði á ferðini verið partur av kypriotisku fótbóltssendimonnunum, sum vóru um føroyska liðið. Meðan prátið í foyéránum á hotellinum gongur um leyst og fast, nevnir Jens Erik Magnussen, ið var ein av leiðarunum á ferðini, brádliga: »Tú Jákup. Hasi gamli maðurin, sum alla tíðina er her. Hann skuldi faktist verið við, tá flogfarið hjá Manchester United datt niður í 1958.«

Sum svorðin viðhaldsmaður hjá reyðu devlunum, var hetta ein søga, sum mátti hoyrast frá manninum sjálvum. Journalistiska forvitnið syrgdi fyri, at diktafonin eisini varð sett við borðið, og fryntligi maðurin hevði einki ímóti at siga sína søgu. Eina søgu, sum eisini gjørdist um eitt hugnaligt prát við ein mann, sum hevur roynt seg víða um í enska fótbóltsheiminum, men sum at enda setti kósina heim til Kypros, har hann framvegis er partur av støðuga menningararbeiðinum hjá fótbóltinum har á leiðum.

– Tá í tíðini vart tú nógv nærri spælarunum, enn tú ert í dag. Og spælararnir kendu nokk eisini bæði viðog serliga mótleikarar betri. Eg hevði sjálvur spælt nógv ímóti fleiri av spælarunum hjá Manchester United í yngru røðunum. Og ofta nýtti felagið eisini okkara vøllir á YMCA, tá teir fyrireikaðu seg til kappingarárið.

– Sjálvur spældi eg eisini í Oldham Athletics, og tí hevði eg eisini verið partur av onkrum vinardysti móti felagnum, so alt í alt kendi eg fleiri av spælarunum hampuliga væl. Dennis Violet, Johnny Berry og fleiri aðrir taldust millum vinmenninar hjá mær. Ein partur, sum hevði nógv størri týdning tá í tíðini, tá lønin hjá okkum vanliga var eini £20 um vikuna.

– Eg var so eisini millum teirra, sum hugdu at fyrra dystinum móti Reyðu Stjørnu í 1/4-finaluni av Europa Cup kappingini. Ein dystur, sum United vann 2-1, og tað skuldi sjálvandi feirast. Ikki minst var talan um eitt einastandandi kvøld, tí vit koyrdu eitt sindur í konurnar hjá spælarunum, sum valla megnaðu at standa á beinunum, flennir hann.

– Tað endaði alt við, at spælararnir spurdu meg, um eg ikki kom við flogfarinum til útidystin, og hesum játtaði eg. Flogið varð knappar tvær vikur eftir ballið, men í seinastu løtu gav eg avboð. Eg hevði ongantíð flogið fyrr, og dirvið var kortini ikki til at royna tað hesaferð.

Uttan John varð soleiðis ferðast til jugoslaviska høvuðsstaðin, har ensku meistararnir við einum 3-3 javnleiki spældu seg í hálvfinaluna. Men á heimferðini hendi so vanlukkan. Flogfarið var ikki nóg væl avísað, og eftir millumlending í München gekk galið. 22 fólk doyðu á staðnum - teirra millum 7 spælarar. Og stutt eftir doyði eisini Duncan Edwards av løstunum, sum hann fekk. Duncan Edwards hevði longu tá verið yngsti spælarin í søguni hjá ensku 1. deild, og hann hevði eisini metið sum yngsti landsliðsspælarin hjá Onglandi.

## Sorgin nívir enn

Tað er sjónligt, at hóast John helst hevur sagt hesa søguna ofta, so er tað framvegis við kenslum, at hon verður søgd. Nakað sum hann eisini játtar, tá spurt verður, hvussu hann varð ávirkaður, tá hann hoyrdi um vanlukkuna.

– Tað var jú ræðuligt. Dennis, ið var tann av spælarunum, sum eg kendi best, slapp við lívinum, men hann er so kortini farin nú. Men sjálvt um hann slapp livandi úr München, so varð hann ongantíð tann sami á vøllinum. Eins og hevði hann fingið ein skelk og eina áminning um, at slíkt altso kann henda í veruleikanum, og tann veruleikan megnaði hann helst ongantíð at góðtaka.

– Og fyri fótbóltin var tað jú ræðuligt. Duncan Edwards, sum var kanska størsta enska talentið um tað mundi, doyði. Hann skuldi annars verið í herinum um hetta mundið, men felagið hevði so fingið hann loystan frá hesum, soleiðis at hann kundi verið við í dystunum.

## Bilførari fyri Brian Kidd

Men hóast alt, so helt lívið fram. Eisini á Old Trafford, har Manchester United heldur til.

Venjarin, Matt Busby, var ein teirra, sum kom livandi